# r í Gøtu



ikki ein orsøk til at hon fór á heilsuskúlan í Suðuroy. Ella øvugt.

Tað er helst so, sum Hanna málber seg við einum brosi: - Teir fara neyvan at gera eitt sambýli her úti, bara tí eg havi fingið mær eina útbúgving!

Um hetta ein dag gerst veruleiki, er ikki óhugsandi at Hanna fer at søkja um arbeiði.

- Men hinvegin, so mær dámar sera væl í Gøtu, tað vil eg siga. Har er góð leiðsla, góð starvsfólk og fitt búfólk.

- Haraftrat er húsið bæði gott og arbeiðsligt, sigur hon.

*Teir fara neyvan at gera eitt sambýli her úti, bara tí eg havi fingið mær eina útbúgving!*



*- Tað tók sína tíð at venja seg við at hava eitt heim eisini í Klaksvík, sigur Hanna*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Aftur á skúlabonk 40 ár seinni

**At Hanna yvirhøvur kom so langt sum at fáa sær arbeiði á eldrasambýlinum í Gøtu, kann hon takka manni sínum og Heilsuskúlanum í Suðuroy fyri**

SKÚLAGONGD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

- Ja, hvussu eg endaði har á gamalsaldri, - tað hevur eisini sína søgu, greiðir Hanna brosandi frá.

Hon og maðurin vóru vorðin einsamøll í húsi, tí allar døturnar vóru farnar av bygdini. Og henda eina dagin spyr maðurin, Eyðun hana um, hvat hon ætlaði sær.

- Hví fert tú ikki í skúla?!, spurdi hann meg beinleiðis.

Hetta kom sera óvart á Honnu: - Eg? Meinar tú við meg? Skal eg kanska fara í studentaskúla ella hvat?, var fyrsta hugsanin hjá mær.

- Nei, eg hugsi um heilsuskúlan á Tvøroyri, svaraði maðurin aftur.

Hon søkti eitt árið, men slapp ikki inn beinanvegin, tí henni vantaði ymiskar lærugreinar.

Lestrarvegleiðarin á skúlanum bað hana fáa sær eitt sindur meiri av føroyskum á HF-skeiðnum í Klaksvík.

- Hetta kláraði eg, og fekk enntá eitt sera pent ummæli frá teimum, sum eg so sendi saman við umsóknini.

- Og mín sann um ta ikki eydnaðist mær at koma inn aðru ferð eg søkti, sigur hon brosandi.

## Ikki smæðin

Hanna byrjaði so at fyrireika seg til at byrja skúlagongdina. Eitt var tann langi vegurin millum heimið og skúlan.

Tann størra avbjóðing hennara mundi kortini vera, at hon var komin nakað til árs. Í dag er hon 58 ára gomul.

Nógvir spurningar fóru gjøgnum høvd hennara, nú hon aftur skuldi seta seg á skúlabonk.

- Tja, eg hevði ikki gingið í skúla tey seinastu 40 árini, og eg var spent uppá, um eg yvirhøvur fór at klára at fylgja við í undirvísingini.

- Men eg hugsaði, at eg kundi so altíð fara suður. So hevði man í øllum førum roynt tað!, sigur hon við einum brosi.

Hinvegin kundi hon skjótt staðfesta, at munur var á pedagogikkinum í dag og tá hon gekk í skúla – tann positiva vegin!

- Fyrr var tað so, at kom ein smæðin næmingur í skúla úr eini lítlari bygd, ja, so slapp hesin at sita smæðin. Tað bleiv ofta so, at tey sum vóru von at taka orðið, tey høvdu orðið.

- Nú er tað øðrvísi. Um tú einki sigur, sleppur tú ikki tað, tí tú verður drigin við í prátið. Tú skalt siga nakað, og tað haldi eg er øgiliga gott, sigur hon.

*Fyrr var tað so, at kom ein smæðin næmingur í skúla úr eini lítlari bygd, ja, so slapp hesin at sita smæðin*